# Starvsmannafelagið aðalfund leygardagin



*Gunnleivur Dalsgarð hevur verið formaður í Starvsmannafelagnum síðan á heysti 1997, tá ið Jákup Danielsen legði frá sær*

**- Tað er stórur munur á at vera vanligur nevndarlimur í einum slíkum felag - og so at vera formaður, sigur Gunnleivur Dalsgarð**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*

Leygardagin komandi heldur Starvsmannafelagið aðalfund í Havnar Klubba.

Formaðurin í felagnum, Gunnleivur Dalsgarð, sigur, at formansval er ikki aftur fyrr enn næsta ár, og tí verður einki formansskifti hesaferð.

- Hetta verður ein vanligur aðalfundur við teirri fundarskrá, sum lóg felagsins ásetir. Tey heilt stóru málini eru ikki á skránni hesaferð, sigur hann.

Gunnleivur vísir á, at sáttmálarnir við kommunurnar og fíggjarmálaráðið ganga út, 1. oktober í ár, og felagið er í holt við at fyrireika seg til samráðingarnar, sum verða. Sáttmálarnir við Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum umboðar Føroya Tele og við SEV, ganga út, 1. apríl, komandi ár.

- Hesi mál verða helst eisini til umrøðu á aðalfundinum, sigur hann.

### Ein avbjóðing

Gunnleivur Dalsgarð tók við sum formaður í Starvsmannafelagnum, tá ið Jákup Danielsen legði frá sær í úrtíð á heysti í 1997. Við valið í 1998 varð Gunnleivur valdur til formann, og hevur hann verið formaður í felagnum síðan.

- Eg visti ikki, at Jákup fór at leggja frá sær. Tí var tað ein stór avbjóðing at taka við formanssessinum so brádliga.

Gunnleivur var trý ár í nevndini í Starvsmannafelagnum, áðrenn Jákup legði frá sær, og Gunnleivur gjørdist formaður.

- Tað er stórur munur á at vera vanligur nevndarlimur í einum slíkum felag - og so at vera formaður, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

# Starvsmannafelagið verður vertur fyri norðurlendskari ráðstevnu í Føroyum

**- Undir verkfallinum her heima í 1999, fingu vit samband við íslendska fakfelagið, BSRB, sum stuðlaði okkum ómetaliga væl, bæði moralskt og fíggjarliga. Hetta hevði stóran týdning fyri okkum í tí stríði, sum tá var, sigur Gunnleivur Dalsgarð, sum heldur, at limaskapurin í norðurlendska felagsskapinum, NTR, fer at hava stóran týdning fyri Starvsmannafelagið**



*Norðmaðurin, Flemming Hansen, er aðalskrivari í NTR. Sosialurin møtti honum av tilvild úti á Skansanum ein sunnumorgun herfyri. Saman við einum dana, var hann í Føroyum og hugdi at umstøðunum til ráðstevnuna, sum verður á Hotel Hafnia seinast í august.*
Mynd: Vilmund Jacobsen

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Í døgunum, 28.-31. august í ár, heldur felagsskapurin, NTR, Nordisk Tjenestemansråd, ráðstevnu í Føroyum. NTR er ein felagsskapur av fakfeløgum úr øllum norðurlondum, sum umboða kommunal-og alment lønt starvsfólk. Felagsskapurin hevur út við seksti ár á baki, men Starvsmannafelagið, sum umboðar tilsvarandi fólk í Føroyum, er nýggjur limur. Felagið hevur áður verið við á ráðstevnum hjá NTR sum eygleiðari, men á árliga fundinum hjá felagsskapinum í Høfn í Íslandi í fjør, gjørdist Starvsmannafelagið formelt limur. Stórur áhugi hevur nevniliga verið millum hini norðurlondini at fáa Føroyar við uppí felagsskapin.

Í Høfn varð eisini avgjørt, at komandi ráðstevnan skuldi haldast í Føroyum, og tað er hendan, sum Starvsmannafelagið og NTR-felagsskapurin nú eru í holt við at leggja til rættis.

### Fleiri umboð

Eini seksti fólk úr Føroyum, Íslandi, Danmark, Noregi, Svøríki og Finnlandi verða við á ráðstevnuni, sum verður hildin á Hotel Hafnia. Gestirnir fara at búgva á Hotel Hafnia og á Sjómansheiminum í Havn.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð, sigur, at tá ið ráðstevnan verður í Føroyum, kann felagið, sum er vertur, møta á fundinum við fleiri umboðum enn annars.

Gunnleivur umboðar Starvsmannafelagið í stýrinum fyri NTR.

Formaður í felagsskapinum er í løtuni úr Finnlandi, og undan honum var formaðurin úr Danmark. Formansskifti er triðja hvørt ár, og formaðurin skiftir millum ymisku limalondini.

Norðmaðurin, Flemming Hansen, hevur leingi verið aðalskrivari í NTR. Herfyri var hann í Føroyum saman við einum dana, sum eisini situr í fyrireikingarbólkinum. Í Føroyum tosaðu teir við Starvsmannafelagið um tiltakið og hugdu at umstøðunum her heima.

### Globalisering

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at evnið á ráðstevnuni í Høfn í Íslandi í fjør var globalisering.

- Her vóru mong ymisk mál havd á lofti, eitt nú, hvørja ávirkan ymisk viðurskifti hava á umstøðurnar hjá limunum í einstøku londunum. Flestu mál kenna vit væl og virðiliga aftur í okkara heimligu viðurskiftum. Á ráðstevnuni varð eisini tosað um, hvussu feløgini í norðurlondum kunnu hjálpa og stuðla hvørjum øðrum og koma við góðum ráðum.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum vísir á, at NTR-ráðstevnan vanliga hevur eitt aðalevnið, ið verður viðgjørt. Enn er ikki endaliga avgjørt, hvat evnið verður á ráðstevnuni í Føroyum, men leiðslan í NTR arbeiðir við ymiskum evnum at taka støðu til.

- Í mars verður stýrisfundur í felagsskapinum. Fundurin verður í Oslo, og tá verður støða tikin til, hvat aðalevnið í Føroyum verður, eins og endaliga skráin tá verður løgd, sigur hann.

Ætlanin hjá Starvsmannafelagnum er, at útlendsku gestirnir eisini skulu hava sæð ein part av føroysku náttúruni og føroyskari mentan, áðrenn tey fara avstað aftur. Tí verður helst farið ein túr undir Vestmannabjørgini, eins og gestirnir væntandi fara at vitja í løgtinginum. Ætlanin er eisini at spáka runt í Havnini og síggja, hvat her er.

### Baklandið týdning

Íslendska felagið, sum er limur í NTR, eitur Bandalags Starvsmanna Rigis og Bæja, stytt BSRB, og hetta er størsta felag av sínum slag í Íslandi.

- Undir verkfallinum her heima í 1999, fingu vit samband við íslendska felagið, sum stuðlaði okkum ómetaliga væl, bæði moralskt og fíggjarliga. Hetta hevði stóran týdning fyri okkum í tí stríði, sum tá var, sigur Gunnleivur.

Hann ivast onga løtu í, at tað verður ein fyrimunur fyri Starvsmannafelagið, at felagið nú er limur í NTR.

- Tað gevur okkum styrki at vita, at baklandið úteftir er gott. Hóast NTR er limur í evropeiskum felagsskapum, leggur felagsskapurin ógvuliga stóran dent á norðurlendska samstarvið. Áhugin at stuðla hvørjum øðrum við ráðum og hugskotum er stórur, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð, at enda.





*Enn er Símun V. Arge stjóri fyri Fornminnissavnið, men broytist einki, so má hann læta Steffen Stummann Hansen sæti.*

# Setanin av landsantikvari

**Hóast nógv hava talað í málinum um setanina av nýggjum landsantikvari, stendur setanin við, og í løtuni bíða tey flestu eftir løgmanni**

SAMANUM
*Heri á Rógvi*

Alt byrjar við, at Føroya Fornminnissavn í longri tí virkar uttan nakran fastan stjóra. Arne Thorsteinsson fer úr starvinum um árskiftið 2001-2002. Hann hevði tá í eina tíð verið í farloyvi. Símun V. Arge røkir starvið fyri Arna Thorsteinsson. Hann er eisini settur landsantikvarur, tá Mentamálaráðið 28. september lýsti í føroyskum og donskum miðlum eftir nýggjum landsantikvari. Ávís frávik eru í lýsingunum í Danmark og í Føroyum.

Tá umsøknarfreistin er runnin, 11. november 2002, eru átta umsøknir til starvið.

Ein setanarnevnd, mannað við Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra á Mentamálaráðnum, Petur Nolsøe, løgfrøðingafulltrúa í Mentamálaráðnum, og Andras Mortensen, starvsfólkaumboð fyri Mentamálaráðið, verður sett at viðgera umsøknirnar og gera tilmæli. Eftir ásetingunum í starvsfólkapolitikkinum hjá landinum er tað aðalstjórin, ið setir setanarnevndina. Sum siðvenja er, verður aðalstjórin sjálvur formaður fyri setanarnevndina.

### Tvey tilmæli

Setananevndin fer síðani í holt við at viðgera umsóknirnar. Hon ger fyrst eitt tilmæli, sum einmælt innstillar Símun V. Arge til starvið. Sagt verður, at hesin hevur bestu fortreytirnar, og vantandi menningin av Fornminnissavninum seinnu tíðini ikki skyldast hansara arbeiði, men heldur fortreytunum.

Símun V. Arge er 22. november til fyrstu setanarsamrøðuna við setanarnevndin.

Landsstýrismaðurin, Annlis Bjarkhamar, sum í síðsta enda skal seta starvið, er tó ikki nøgd við tilmælingina. Hon biðjur um eina nýggja, har fleiri fyrilit eisini skulu takast av setanarnevndini. Nevndin so ger, men úrslitið er tað sama; Símun V. Arge er best skikkaður til starvið.

Annlis Bjarkhamar velur at taka málið í egnar hendur. Seinni grundgevur hon hetta stigið við at siga, at hon kendi ein iva á sær um setanina, og tilmælini frá setanarnevndini vóru ikki nóg greið.

Annlis hevur sjálv setanarsamrøður við Símun V. Arge og Steffen Stummann Hansen. Greitt er, at millum teir átta umsøkjararnar er Símun og Steffen nógv teir best egnaðu.

4. februar almannakunngerð Annlis Bjarkhamar, at Steffen Stummann Hansen er settur í starv.

### Í miðlunum

Alt hetta, sum tit higarti hava lisið í hesari greinini, er nakað, sum er komið fram, eftir at setanin gjørdist alment kend.

Frá fyrstu løtu av skapti málið rok. Ein limur í setanarnevndini og fyrrverandi landsantikvrurin søgdu við Sosialin, at teir vóru ikki í iva um, at talan var um eina politiska setan. Stutta tíð eftir, at tíðindaskrivið um setanina er sent út, so byrja ein longri røð av viðerkingum og lesarabrøvum.

Fleiri privatpersónar vísa á, at trúvirðið hjá setanarnevndini ikki er í lagi, og Annlis Bjarkhamar hevur tikið røttu avgerðina.

Seinni koma eisini løgmaður og Magistarafelagið upp í málið. Í tveimum skrivum til Annlis Bjarkhamar ger Magistarafelagi, ið fakfelag hjá Símun V. Arge, at felagið ynskir setanin ógildaða.

Annlis Bjarkhamar hevur allantíðina hildið fast við sítt, og hon eggjar til, at málið verður kannað óheft.

Nú bíða øll eftir løgmanni.

# Anfinn fingið skjølini

**Løgmaður og løgmansskrivstovan eru farin undir at kanna málið um setanina av landsantikvari**

KANNING
*Heri á Rógvi*

Løgmaður, Anfinn Kallsberg, hevur fingið eina rúgvu av skjølum frá Mentamálaráðnum í sambandi við setanina av nýggjum landsantikvari. Løgmaður sendi Annlis Bjarkhamar eitt skriv 5. februar, har hann bað um eina nágreiniliga lýsing í málinum og øll viðkomandi skjøl. Løgmaður hevði tá avgjørt at seta eina kanning í verk av málinum.

Løgmaður fekk skjølini fríggjadagin, og umsitingin er farin til verka at kanna málið nærri.

–Vit hava fingið eina rúgvu av skjølum, og vit eru farin ígongd við at kanna málið. Eg vætni ikki, at tað verður so leingi, áðren vit verða liðug, sigur Anfinn Kallsberg í viðmerking til málið.



*Anfinn Kallsberg ætlar ikki at dvølja leingi við skjølini frá Mentamálaráðnum, men ætlar at gerast skjótt liðugur.*

# Lýsingarnar

Í lýsingini í føroysku fjølmiðlunum eftir landsantikvari er talan um eina lýsing, ið Magistarafelagið hevur góðkent frammanundan. Av einari ella aðrari orsøk velur Mentamálaráðið at seta eina eitt sindur øðrvísi lýsing í danskar fjølmiðlar. Lýst varð bert í donskum miðlum.

### Í føroysku lýsingini stendur at lesa:

"Umsøkjari skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur, kunna arbeiða sjálvstøðugt – og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar"

### Í donsku lýsingini stendur ístaðin at lesa:

"Ansøgeren skal besidde gode ledelses- og samarbejdsevner, være målrettet, selvstænding, resultatorienteret, have lyst og vilje til at gå nye veje, tackle nye udfordringer – og at lede arbejdet på sådan et måde, at instutionen fortsat har en faglig og forskningsmæssig profil både i det færøske samfund og uden for Færøerne"

Seinni hevur orðaljóðið í teimum báðum lýsingum verið eitt av høvuðsargumentunum hjá Magistarafelagnum. Felagið heldur upp á, at søkt verður undir ymsum fortreytum.

Annlis Bjarkhamar heldur ikki, at hetta er orsøk til, at setanin skal ógildast.